Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Undirskrift formansins: _____

Ár 2012, hin 24. januar kl. 17.30 hevði Klaksvíkar Býráð fund, har hesir limir møttu:
Gunvá við Keldu, Jógvan Skorheim, Atli S. Justinussen, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Hans Arne Bertholdsen, Signhild V. Joensen, Jákup F. N. Mikkelsen, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð, Óli M. Lassen og Auðunn Konráðsson.

2012/001.
12/00042 Fyrispurningur um bygging í økinum A10

Frágreiðing um málið:
Borgari hevur sent inn fyrispurning um bygging á matr. nr. 1366a – Nólsoyar Pálsgøtu 7.
Ætlanin er at taka húsini niður og byggja ein umleið 18 x 10 metrar stóran bygning uppaftur. Tann nýggi bygningurin verður í 3 hæddum við kjallara.
Tvey handilshølir í veghædd á 85 m^2 hvørt og tvær íbúðir á ovastu hædd, eisini 85 m^2 hvør.
Ætlanin er at byggja fast í bygningarnar á Nólsoyar Pálsgøtu 5 og 9 og í mark oman ímóti sjónum.
Eisini er ein spurningur, um kommunan hevur møguleika at gera parkeringslummar uttan fyri tann nýggja bygningin (líknandi uttanfyri Apotekið), soleiðis at kundarnir hjá handlinum kunnu seta bilarnar frá sær, meðan teir handla.
Tað bleiv skotið upp, at kommunan fær stykkið, sum matr. nr. 1366a eigur millum verandi bygning og Nólsoyar Pálsgøtu, sum kann gerast til gongubreyt, og matr. nr. 1366a fær sama øki frá kommununi oman ímóti sjónum.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ikki viðgjørt.

Tilmæli:
Tekniska Umsiting hevur ikki havt møguleikan at viðgera málið, tí tað ikki er lýst til fulnar, men um loyvi skal gevast, so krevst frávik fyri:

- Ábygging: Stykkið er 216m2 til støddar, og gevur hetta møguleika at byggja 108m^2 (50%) sambært galdandi økisásetingum. Ætlanin er at byggja 180 m^2 til støddar.
- Bygging í mark: Byggisamtyktin fyri øki A10 sigur, at øll bygging skal vera 2,5 metrar frá marki.

Viðmerkjast skal, at býarplansbólkurin hevur havt ynski um dagføring av hesum økinum fram við Nólsoyar Pálsgøtu.

BBN 9. jan. 2012: Nevndin mælir til at geva loyvi sambært umsókn og at endurskoða økisásetingarnar fyri økið.

TN 10. jan. 2012: Nevndin tekur undir við viðtøkuni hjá BBN, dagf. 9. januar 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/002.
11/00783 Umsókn um sundurmatrikulering – matr. nr. 1568

Frágreiðing um málið:

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Vísandi til býráðssamtykt frá 15. november 2011, hevur málið nú verið úti hjá grannunum til hoyringar. Freistin at lata inn viðmerkingar var úti 3. januar 2012, og ongin viðmerking varð móttikin. 12. januar 2012 kom avvarandi hjá einum granna, við viðmerking til málið, sí notat, dagfest 12. januar 2012.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan ikki partur í málinum

Tilmæli:
Við grundgevingum í tilmæli frá 28. oktober 2011 heldur T.U. tað vera ráðiligt at játta frávik fyri matrikulering av grundøki, minni enn 300 m^2 á hesum staði.

TN 10. jan. 2012: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU, dagf. 5. januar 2012

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/003.
<u>11/01008 Kommunalt lendi til landsveg</u>

Frágreiðing um málið:
Fyri at avslutta matrikuleringina í samband við vegirnar til Norðoyatunnilin skjýtur Umhvørvisstovan upp marknaumskipan, sum víst í tilmæli, dagfest 5. januar 2012.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – Landsverk og Norðoyatunnilin bera útreiðslurnar

Tilmæli:
Tekniska Umsiting hevur hugt eftir uppskotinum og tekur undir við loysnini. Mælt verður tí til, at váttanin verður send Umhvørvisstovuni til avgreiðslu.

TN 10. jan. 2012: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 5. januar 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/004.
<u>12/00004 Frábýti og keyp av lendi til neyst, matr. nr. 714a</u>

Frágreiðing um málið:
Eigarin av neystinum á matr. nr. 714a, stendur á festinum hjá øðrum eigara. Búnaðarstovan biður nú, eftir umsókn, um kommununnar ummæli til, at lendið undir neystinum hjá neystaeigaranum verður frámatrikulerað og selt honum.

Fíggjarligar avleiðingar:

Ongar – kommunan ikki partur í málinum

Tilmæli:
Vísandi til, at flestu neystini í økinum eru bygd á privat ognarstykkir, hevur Tekniska Umsiting ongar viðmerkingar til, at tað sama verður galdini fyri hetta neystið. Sí kortskjal, dagf. 5. januar 2012.

HaVN 10. januar 2012: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 5. januar 2012.

TN 10. januar 2012: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU, dagfest 5. januar 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/005.
11/00900 Umsókn um sundurbýti og serstaka byggisamtykt

Frágreiðing um málið:
Advokatarnir Hentze søkja, vegna arvingar, kommununa um loyvi at frábýta 1/12 av trøðni, matr.nr. 1624a við Oyrarvegin. – Samstundis verður heitt á býráðið um at samtykkja serstaka byggisamtykt fyri økið. Talan er um økið, sum í byggisamtyktini liggur í A9, sí tilmæli 6. januar 2012.

Tilmæli:
Tekniska Umsiting mælir til, at uppskot til serstaka byggisamtykt verður gjørt sum skjótast, og at ongin matrikulering fer fram á økinum, fyrr enn hendan fyrliggur.

BBN 9. jan. 2012: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku Umsiting, dagfest 6. januar 2012.

TN 10 jan. 2012: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU, dagf. 6. januar 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/006.
11/00939 Atkomuviðurskifti hjá KBI

Frágreiðing um málið:
22. nov. 2011 heitir fyritøkan KBI Sp/f á kommununa um at fáa loyvi at gera eina inn- og útkoyring frá ringvegnum oman Eið. Grundgevingin er, at hetta hevði bøtt munandi um parkeringsviðurskiftini við handilshølini, umframt at tað hevði givið eina betri kundarøkt.
Vegna møguligt ógegni á Teknisku Umsiting varð avgjørt at fáa eina uttanveltaða meting av fyrispurninginum. Umsitingin vendi sær tí til ferðslutrygdargrannskoðaran hjá Landsverk fyri at fáa hansara meting av umbønini.
Niðurstøða ferðslutrygdargrannskoðarans er, at ein nýggj inn- og útkoyring frá og til ringvegin fer at økja um vandan fyri ferðsluóhappum. Harumframt metir hann, at við eini nýggjari inn-/útkoyring verður møguleiki fyri ferðslu tvørtur um privatar matriklar. Og á hesum økjum hevur kommunan ikki

møguleika fyri at tillaga ella ferðslutryggja gjøgnumkoyrandi ferðslu. Harumframt kann roknast við øktari parkering fram við ringvegnum, ið fer at hava við sær verri ferðsluviðurskifti eftir sjálvum ringvegnum og tí eisini øktan møguleika fyri óhappum. Ferðslutrygdargrannskoðarin mælir tí ímóti at geva loyvi til eina inn- og útkoyring til ringvegin.

Tilmæli:
Mælt verður frá at geva loyvi til eina inn- og útkoyring til ringvegin, vísandi til frágreiðing ferðslu-trygdargrannskoðarans.

FeN 9. jan. 2012: Gunnleyg luttók ikki í viðgerðini vegna ógegni.
Mælt verður til at játta inn- og útkoyring sambært umsókn, grundað á, at bygningurin er so staðsettur, at ringt er at koma til og frá, og at tað frammanundan eru nógvar aðrar inn- og útkoyringar eftir øllum ringvegnum. – Kommunan ber ongar útreiðslur av arbeiðnum, sum verður at gera í samráð við Tekn-isku Umsiting kommununnar

TN 10. jan. 2012: Ein meiriluti í nevndini, Óli M. Lassen, Hans Arne Bertholdssen og Jógvan Skorheim, tekur undir við tilmæli frá TU, dagf. 6. januar 2012. Ein minniluti, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, tekur støðu í býráðnum.

Býráðsins samtykt:
Broytingaruppskot frá Steinbjørn O. Jacobsen, um at taka undir við tilmælinum frá Ferðslunevndini við tí treyt, at tey neyðugu ferðslutrygdartiltøkini, sum liggja í kortunum at gera í hesum sambandi, verða gjørd skjótast gjørligt, varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (Auðunn Konráðsson, Óli M. Lassen, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð og Hans Arne Bertholdsen) og 0 ímóti. Jákup F. N. Mikkelsen og Signhild V. Joensen atkvøddu ikki.

2012/007.
<u>08/00135 Umboðsnevndin fyri IRF 2009-2012</u>

Veljast skal nýggjur limur í nevndina fyri IRF fyri Jógvan Skorheim, býráðslim, sum noyðist at leggja frá sær, tí hann er valdur í Føroya Løgting.
Málið var á skrá til Býraðsfundin 13. desember 2011, men varð útsett.

Býráðsins samtykt:
Atli S. Justinussen valdur sum limur og Auðunn Konráðsson sum varalimur í nevndini.

2012/008.
<u>11/00955 Skaði á gøtuljós, ódnarveður í nov. 2011</u> *<u>– eykajáttan – 2. viðgerð</u>*

Býráðið samtykti málið fyrru ferð á býráðsfundinum 13. desember 2011.

FíN 17. jan. 2012: Vísandi til fyrru býráðssamtykt 13. desember 2011, beinir nevndin málið í býráðið til seinnu samtykt.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/009.
2006-19-095 Samstarv um verkætlanina "Gamligarður" *– eykajáttan – 2. viðgerð*

Býráðið samtykti málið fyrru ferð á býráðsfundinum 15. november 2011.

FíN 17. jan. 2012: Vísandi til fyrru býráðssamtykt 15. november 2011, beinir nevndin málið í býráðið til seinnu samtykt.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/010.
11/00026 Skipan av frítíðarskúla

Frágreiðing um málið:
Sambært bókhaldinum eru kr. 1.585.051 brúktar til umbygging av frítíðarskúlanum.
Upprunaliga vóru kr. 1.000,.000 settar av til umbyggingin av bygninginum, men í september varð mál lagt fyri býráðið, har boðað varð frá, at kostnaðurin fór at verða kr. 1.325.000. Av tí at málið um eykakostnaðin ikki upplýsti, hvussu meirkostnaðurin skuldi fíggjast, er játtanin/avsetingin 2011 til renoveringina óbroytt, kr. 1.000.000,-
Sambært bókhaldinum í dag eru kr. 1.585.051,- bókaðar upp á renoveringina, men aðrar íløguútreiðslur á kr. 185.000 eru bókaðar undir rakstur av frítíðarskúlanum. Hetta verður nú rættað – vit umbóka nevndu útreiðslur yvir á íløgur – og við hesum kemur umbyggingin av frítíðarskúlanum at kosta kr. 1.770.051,- Mett verður ikki, at aðrar týðandi útreiðslur eru ávegis í samband við renoveringina av frítíðarskúlanum.
Sum nevnt, er verandi játtan kr. 1.000.000,- og nýtslan verður áleið kr. 1.770.051,- Í september var meirnýtslan mett til kr. 325.000,- men nú roknskapurin er um at verða liðugur, er meirnýtslan 770 tkr. Sí tilmælið, dagfest 6. januar 2012.

Niðurstøða:
Avsetingin til frítíðarskúlan er kr. 1.000.000,- Í september varð meirnýtslan mett til 325 tkr., men í dag kunnu vit staðfesta, at renoveringin kemur at kosta ca. 1,8 mkr.
Frítíðarskúlin rakstur kemur at hava umleið 30-40 tkr. í meirnýtslu. Orsøkin er, at umvælingin av bygninginum dró út, og hetta gjørdi, at inntøkurnar eru umleið 60 tkr. minni enn mett.

SoN 11. jan. 2012: Forkvinnan kunnaði um meirnýtsluna. Hans Hendrik Mikkelsen og Beinta Klakkstein komu á fundin kl. 13:30. Tey greiddu frá gongdini í byggingini, og hví meirnýtslan bleiv so stór. Nevndin staðfesti meirnýtsluna.
Nevndin vísir á, at viðurskifti viðvíkjandi verkætlanum og umbyggingum í kommununi mugu skipast betur. Serstakliga viðvíkjandi útgreining av kostnaðum og fíggjarligari uppfylging.

FíN 17. jan. 2012: Nevndin tekur undir við Sosialu nevnd 11. januar 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/011.
11/00541 Viðv. asfaltering av øki í Árnafirði

Tekniska Umsiting metir, at kostnaðurin at asfaltera uttan um alihúsið í Árnafirði verður hesin:

Ífylla	kr. 25.000,00
Planering	kr. 31.250,00
Asfaltering	kr. 112.500,00
Samlað, írokna 25% mvg	kr. 168.750,00

HaVN 13.sept. 2011: Mælt verður til at seta neyðuga upphædd av til arbeiðið í 2012

HaVN 10. jan. 2012: Nevndin mælir til, at arbeiðið verður framt.

FíN 17. jan. 2012: Nevndin tekur undir við Havna- og Vinnunevndini og mælir til, at arbeiðið verður fíggjað av standardkontu 165200 innan rakstur hjá Klaksvíkar Havn.
Samstundis eftirlýsir nevndin, at upplýst verður í øllum málum, hvussu útreiðslurnar verða fíggjaðar, og fer nevndin framyvir ikki at góðtaka, at mál verða løgd fyri uttan hesar útreiningar.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/012.
11/00229 Avseting til býarplansarbeiði.

Frágreiðing um málið:
Játtanin til býarplansarbeiði varð 800 tkr. í 2011, og við einari avseting uppá 900 tkr. í ár roknar kommunan við at koma á mál við miðbýarætlanini í 2012.

Miðbýararkitekturin hevur í samráð við stýrisbólkin biðið um ymiskar dagføringar av ráðleggingar-tilfari og gjørt tilmæli til kommununa um virðisløn og innkeyp av uppskotum, har upphæddirnar eru nakað størri enn tað, sum vit áður hava umrøtt og viðgjørt.

Fíggjarlig uppseting:

Eftir at gjalda til SN	225 tkr.
Virðisløn 1	400 tkr.
Virðisløn 2	150 tkr.
5 innkeyp av uppskotum	250 tkr.
Døming o.a.	170 tkr.
Í alt	1195 tkr.
Tøk upphædd (2011+2012)	915 tkr.
Írestandi játtan	280 tkr.

Tilmæli:
Umsitingin kann taka undir við omanfyri standandi fíggjarviðurskiftum og mælir til, at neyðuga meirjáttanin til býarplansarbeiði verður fíggjað av:

Tekniska Umsiting: 90 tkr. av ”lønir” (avloysarin fyri HP byrjar ikki fyrr enn 01.03.2012)
Tekniska Umsiting: 40 tkr. av ”keyp av vørum”
Kloakkir: 150 tkr. av ”sakkøn hjálp”
Mett verður, at raksturin í 2012 fer at geva rúm fyri omanfyri standandi broytingum.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar.

BBN 9. jan. 2012: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku Umsiting, dagfest 5. januar 2012.

TN 10. jan. 2012: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU, dagf. 5. januar 2012

FíN 18. jan. 2012: Nevndin tekur undir við Byggi- og Býarskipanarnevndini 9. januar 2012 og Teknisku nevnd 10. januar 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.